LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS

# Tváttur við klórhesidinsápu

(Hisbiscrub® 4%)

## Vegleiðing til at nýta sóttreinsandi sápu/klorhexidinsápu, kvøldið fyri skurðviðgerðina, og morgunin tann dagin, sum skurðviðgerðin verður gjørd..

*Minst til, at brúka oyraproppar. Tygum mugu ikki nýta aðrar sápur.*

Best er at fara í brúsubað og sproyta vatnið yvir allan kroppin,- skrúva vatnið fyri. Byrja at seta sápuna í hárið, vaska síðani hárið væl. Minst til, at sápan má ikki fara í eygu ella oyru.

Stoytið sóttreinsandi sápuna í ein eygnalappa. Umráðandi er, at húðin er so rein sum gjørligt, og at tygum vaska tygum væl áðrenn skurðviðgerð.

### Vaska serliga væl:

**1** - Andlitið, og kring um nøsina.
**Ansa eftir, at sápan fer ikki í eyguni.**

**2** - Undir arminum og millum bæði bróstini.

**3** - Um búkin, serliga nalvan.

**4** - Um føturnar, og millum tærnar.

**5** - Kynsgøgn, rumpuna og í lærkreppingini.




Skola kroppin væl. Endurtak frá byrjan.
Brúka ein reinan eygnalappa.

Turkið tygum væl um kroppin, og latið tygum í rein undirklæðir og reinar sokkar. Krem oljur ella annað luktilsi má ikki verða smurt á húðina. Ikki ganga berføtt/ur brúka inniskógvar.

Klorhexidinsápa er sóttreinsandi sápa. **Húðin kann gerast viðkvom eftir sóttreinsandi sápu.**

*Sýkingarvarnadreild 2012*

Hönnun: Landspítali/SS010212